# Margarinfabrikkin letur upp aftur



*Tað er ein stór umvæling, ið er gjørd á Margarinfabrikkini eftir herverkið í farna mánað.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Eftir at Margarinfabrikkin í Havn fyri einum góðum mánað síðani var fyri herverki, hava handverkarar arbeitt við at gera tilhaldsstaðið hjá okkurt um 200 børnum í Havn í stand aftur, og nú verður latið upp aftur**

UMVÆLING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var um morgunin tann 24. august, at starvsfólk á Margarinfabrikkini varnaðust, at ein maður hevði gjørt herverk í hølunum, og at stórur vatnskaði var hendur.

Viðkomandi, ið hevði framt herverkið, lá tá og svav í hølunum, og hann var handtikin av løgregluni.

Vatnskaðin var ógvuliga umfatandi, og seinasta mánaðin hava handverkarar arbeitt við at umvæla skaðan, og nú er arbeiðið við at verða liðugt.

Á heimasíðuni hjá Tórshavnar Kommunu, www.torshavn.fo, stendur at lesa, at Margarinfabrikkin letur upp aftur komandi mánadag, og tað eru tað ivaleyst nógv børn í høvuðsstaðnum, sum fegnast um.



*Nógv verður gjørt við húsini, ið Suðuroyar Sparikassi skal flyta í eftir nýggjár. Sambært deildarleiðaranum í Havn, Rúna Johannesen, verður talan um størri og nógv betur hølir.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Suðuroyar Sparikassi nýggj høli í Havn

**Fyrst í komandi ári verður deildin hjá Suðuroyar Sparikassa í gonguøtuni í Havn latin aftur og flutt verður eitt lítið petti niðan eftir Niels Finsensgøtu**

FLYTING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Líka síðani at Suðuroyar Sparikassi síðst í nítiárunum læt upp deild í høvuðsstaðnum, hevur deildin hildið til mitt í gonguøtuni í miðbýnum, men fyrst í komandi ári verður flutt.

## Størri og meiri nútímans hølir

Nýggja deildin kemur at halda til í Niels Finsensgøtu 31, beint yvir av bilstøðini Auto, í hølunum, har handilin hjá Minu Wilhelm áður hevur verið.

Rúni Johannesen, ið er deildarleiðari hjá Suðuroyar Sparikassa í Havn, sigur, at í løtuni verða hølini umbygd, og at alt arbeiðið væntandi verður liðugt einaferð fyrst í komandi ári.

- Vit fara at fáa nýggj hølir, sum eru bæði størri og meiri nútímans enn tey, sum vit hava nú, sigur Rúni Johannesen.

Um viðskiftafólkini hjá sparikassanum fara at merkja nakað til flytingina, dugir Rúni Johannesen tó ikki at siga nakað um í verandi løtu.

